*Leivur Hansen, býráðsform. heimaftur av oljumessu í Texas:*

# – Tey tosa um føroyska olju sum var hon til

*Nú um dagarnar kom býráðsformaðurin í Havn, Leivur Hansen heimaftur av áhugaverdari og heldur sjáldsamari ferð. Saman við umboðum fyri Stavanger kommunu hevur hann vitjað heimsins størstu oljumessu, hana í heimsins oljuhøvuðsstaði, oljuvinnunar Mekka, Houston í Texas. Og boðskapurin hann hevur heimaftur við sær er eingin minni: olja er í føroysku undirgrundini - wait and see.*



*Leivur Hansen, býráðsformaður í Havn á „sightseeing“ í Houston og har áin rennur úr í Meksikanska flógvan, eitt av heimsins ríkastu oljuøkjum.*



Jan Müller

Tað er ein fegin og bjartskygdur býráðsformaðurin, sum nú er komin heimaftur á klettarnar úti í Atlantshavi, tí við sær hevur hann eina rættiliga avgjørda fatan av, at olja finst í føroysku undirgrundini. -Fólk, sum eg hitti, tosaðu um føroysku oljuna, sum var hon til. Vit vita tað jú ikki, og tí ætla eini 15 oljufeløg sær at lata umsókn um leitiloyvi í næstu viku, men tað er kortini gott at vita, sær, at serfrøðingar av ymsum slag, úr allari verðini, ið hittast í Houston, við so stórari vissu kunnu siga, at olja er í okkara undirgrund.

### Týdning at luttaka

Leivur Hansen dylur ikki fyri, at ferðin til Houston var eitt stórt upplivilsi og hevur hon eisini givið sær nógv at hugsa um. -Eg síggi, hvussu umráðandi tað er hjá okkum føroyingum at luttaka á slíkum framsýningum, og tí síggi eg eisini fram til, at føroyingar fara at luttaka á ONS-oljumessuni í Stavanger í august sigur hann og vísir á, at hann knýtti mong týðandi vinabond á messuni í Texas. Túrurin hevur sannført býráðsformannin í landins størstu kommunu, at tað hevur alstóran týdning at hava samband við onnur til tess at kunna byggja upp eitt forstáilsi fyri hvørjum øðrum. Heldur man so burtur, so er man sleptur uppá fjall. Tí er tað skilagott av føroyingum at vera við á bæði fiskivinnu-, ferðavinnu- og oljumessum heldur Leivur Hansen.

-Tað er greitt, at Norðsjógvurin og Atlantsmótið er ikki tað tú hoyrir nógv til á slíkari messu, tí tað eru tey trý økini, Mexicoflógvin, Brasilia og Vesturafrika, sum standa ovast á listanum, tá ræður um framtíðar leitiøki. Men lat okkum nú sleppa í gongd í Føroyum eisini, so koma vit kanska at venda hesi myndini sigur ein rættiliga bjartskygdur Leivur Hansen, sum sigur seg hava nógv at takka norðmonnum fyri, at hann kom við á messuna.

### Avjgørd um olju her

Leivur Hansen sær vitjanina sum ein lið í tí samstarvi, ið er við at taka seg upp millum stóru oljubýirnar kring Norðsjógvin, Stavanger og Aberdeen og nú eisini Tórshavn. Í oktober í fjør varð Tórshavn boðin við til WECP-stevnu í Stavanger, sum 10 orkubýir ymsastaðni í heiminum standa fyri. Tað var annars á oljuráðstevnuni í Aberdeen í fjør, at Leivur Hansen kom í samband við norðmenn, sum buðu føroyingum at vera við í orkubýarsamstarvinum. Tað var tá, at býráðsformaðurin í Havn varð boðin við til Texas sum partur av tí 300 stóra norska luttakaraskaranum. Noreg hevði sín egna bás á messuni í Houston. Leivur Hansen sigur, at hóast hann var einsamallur føroyingur har, so kendi hann seg ikki einsamallan. -Tað kom heilt óvart á meg, at so mong fólk á messuni, kendu og vistu um Føroyar og at tey vóru so avgjørd um, at olja finst her.

Hetta er 32. árið á rað, at Houston,oljuvinnunar Mekka, er vertur fyri heimsins størstu oljumessu. 80 lond luttóku hesaferð. Norðmenn hava verið við seinastu 15 árini.

Á oljumessuni í Aberdeen í fjør varð avtala gjørd millum Tórshavnar Kommunu og býarstýrið í Aberdeen um framtíðar samstarv. Í tí sambandi varð avgjørt at seta hvør býurin skuldi seta eina seksmannanevnd til at fylla út karmin í samstarvinum. Havnin hevur nú valt sína nevnd, sum m.a. fær til uppgávu at fyrireika vitjanina hjá borgarstjóranum í Aberdeen, Margareth Smith í næstum. Hetta er ein vitjan sum hon sær nógv upp til, tí hon metir samvinnuna við Føroyar av so stórum týdningi.

### Oljan knýtir saman

Fyri at enda sirkulin so ætlar Tórshavnar Kommuna eisini at fáa eitt samstarv við Stavanger Kommunu. Og tá ONS-ráðstevnan verður í Stavanger í august fara tær báðar kommunurnar at skriva undir eina avtalu, sum skal stuðla uppundir bæði mentanarligt og vinnuligt samstarv millum býirnar og fyritøkur í báðum plássum. Leivur Hansen sigur, at norðmenn hann møtti í Houston eru sera fegnir um, at Atlantsflog fer undir beinleiðis rutusamband millum Føroyar og Stavanger, men tað kom eitt sindur óvart á teir, at teir einki vistu um nýggju rutuna. -So eg kann bert bera hesi boðini víðari til Atlantsflog sigur býráðsformaðurin, sum sjálvur sær stórar møguleikar í samvinnuni við Stavanger og Aberdeen. Hann viðgongur, at tað er oljan, sum hevur knýtt hesar býir saman og vil hann gera sítt til, at talan ikki bara verður um orð men um miðvíst samstarv, ið eisini kann gagna Føroyum sum heild og ikki bert Havnini.



*Leivur Hansen, býráðsformaður her saman við fyrrv. og núverandi borgarstsjórum í Stavanger og borgarstjóranum fyri Sandnes kommunu*



*Leivur Hansen í góðum selskapi saman við borgarstjóranum í .Stavanger og Aberdeen og umboði fyri Houston kommunu*



# Nógv ferðsla

*Tað var trongligt í Tórshavnar Havn mánamorgunin. Farmaskipini komu øll í senn. Norrøna byrjaði summarsiglingina, og fremmand fiskiskip vóru og umskipaðu*



*Mánamorgunin var serliga nógvur farmur skipaður upp í Havn. M. a. tí okkurt av skipunum kom við elementum til ein stóran handilsbygning*

Edvard Joensen

Tað var nógv ferðsla í Tórshavnar Havn mánamorgunin. Øll tey vanligu farmaskipini komu eftir ætlan. Summarferðaætlanin hjá Norrønu er byrjað, og tað merkir, at har er eisini eitt farmaskip aftrat, sum skal røkja farmarutuna, Norrøna hevur røkt í vetur.

Jónsvein Lamhauge, havnarstjóri í Havn, sigur, at tað er líkt til, at ferðslan økist munandi um summarið. Soleiðis sær tað út hvørt ár, sigur hann, uttan tó at geva eitt boð uppá, hví tað er so.

Mánamorgunin var kanska serliga nógvur farmur, sigur hann, tí okkurt av skipunum kom við elementum til onkran stóran bygning, sum skal setast upp onkustaðni í landinum.

Havnarstjórin sigur, at tað merkist væl, at gongd er í aftur byggivinnuni. Og tað gevur so eisini inntøkur til Tórshavnar Havn. Tórshavnar Havn fylgir nágreiniliga gongdini í samfelagnum annars. Tá kreppan var, merktist hon sanniliga eisini hjá Tórshavnar Havn, sigur hann.

Jónsvein Lamhauge sigur, at tað er tiltrongt við eini víðkan av havnini. Ein dag sum hendan mánadagin er rættiliga trongt, tá molin er fullur av farmaskipum, fiskiskip liggja og skipa um undir havnarskrivstovuni, og Norrøna liggur inni í krókinum. Umframt lá Claymore, sum skal loysa Smyril av, eisini við bryggju í Havn mánamorgunin.

Um sjálva útbyggingina, sum er í gongd í løtuni, sigur hann, at sum er gongur eftir ætlan, og væntandi verður tað stóra arbeiðið liðugt í hesum árinum. Tað kann vera, at okkurt so sum asfalteringsarbeiði verður eftir til komandi ár.

# 15 útlendsk og 2 føroysk oljufeløg við í útbjóðing



*Oljumálastýrið er nú flutt í henda bygningin í Hoyvík. Her er partur av manningini í Oljumálastýrinum*

**Mynd Jens Vang**

Jan Müller

Um nærum somu tíð sum dyrnar verða latnar upp í nýggju hølunum hjá Oljumálastýrinum í Hoyvík, verður latið aftur fyri innlating av umsóknum til at leita eftir olju og gassi við Føroyar. Í morgin 17. mai klokkan 12 skulu oljufeløg hava latið sína umsókn inn og eftir hvat skilst er áhugin stórur fyri at vera við í fyrstu útbjóðingini her nakrantíð.

Í gjár varð greitt, at nýggja felagið í fyrrv. Sagabólkinum er tað italska Agip. Felagið kemur upp í bólkin hjá Norsk Hydro (Saga Petroleum Føroyar) og Anadarko og avloysir harvið Total Fina Elf, sum fór úr bólkinum herfyri.

Brynjulv Kløve frá Norsk Hydro sigur, at bólkurin er sera væl nøgdur við at hava fingið Agip við, tí italska felagið hóskar so væl saman við hinum feløgunum, ikki minst tá tað snýr seg um tøkniliga partin. Agip passar inn í bólkin sum fótur í hosu. Eisini Agip er nøgt við at koma uppí henda bólkin. Ron Lansdell frá Agip sigur, at hetta er eitt gott val. Hann upplýsir annars, at Agip eisini fer at lata inn eina umsókn saman við einum øðrum oljufelag. Saman við Marathon Oil fer Agip sum operatørur at lata enn eina umsókn inn. Tvs. at Agip fer at søkja um boriloyvi á landgrunninum í tveimum ymsum bólkum. Sambart Agip er hetta ikki nakar trupulleiki. Í umsóknini teir lata inn saman við Marathon meta teir seg ikki at vera kappingarneyta til umsóknina teir lata inn saman við Norsk Hydro og Anadarko.

Sosialurin frættir annars, at Føroya Kolvetni fer at lata inn umsókn einsamalt. Teir stíla ímóti at kunna koma saman við onkrum bólki eftir at umsóknarfreistin er úti í morgin. Hvat viðvíkur peningaligu orkuna hjá felagnum at vera við í útbjóðingini, so fer hetta at koma uppá pláss sambart Nils Sørensen, stjóra. Hvat viðvíkur stevningini móti teirra ráðgevum í Sagex, so hevur rætturin í Oslo enn ikki felt dóm. Norsk Hydro hevur onga viðmerking til tað málið. Tað var annars Norsk Hydro, sum herfyri stevndi fyrrv. Sagafólkum fyri at forða teimum í at vera við í arbeiðinum uppá 1. útbjóðing.

Tað skilst annnars, at tað er stórur spenningur um luttøkuna í 1. útbjóðing, nú dagin fyri at freistin gongur út. Eftir øllum at døma vera umsøkjararnir hesir:
BP Amoco - Amerada Hess, Dong, British Gas og Atlants Kolvetni - Texaco, Conoco, Murphey - Norsk Hydro (Saga Petroleum Føroya), Anadarko og Agip - Agip og Marathon - Statoil, Phillips, Veba Oil og Enterprise og sum rosinan í pylsuendanum Føroya Kolvetni, sum letur inn umsókn einsamalt. Tvs. talan verður um 15 útlendsk og 2 føroysk oljufeløg.

Tey fyrstu útlendsku oljufeløgini hava longu latið umsóknir sínar inn til Oljumálastýrið. Í gjár vóru Norsk Hydro, Anadarko og Agip við síni umsókn. Í dag standa Texaco, Conoco og Murphey á listanum, í morgin BP Amoco, The Faroes Partnership osfr.



*Nevndarformaðurin í Føroya Kolvetni, Graham Stewart leggur seinastu hond á umsóknina um at vera við í leitingini á landgrunninum. Mynd Jens K. Vang*